# Flytingar á flogvøllinum

**Atlantsflog og Flogfelag Føroya fara í næstum at skifta um avreiðsluhøli á flogvøllinum. Og bankin verður burtur**

FLYTINGAR
*Edvard Joensen*




*t standa Atlantic Airways á hølunum, har Flogfelag Føroya í ein mansaldur hevur hildið til á flogvøllinum í Vágum*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Vágar:**
Umleið hálvan januar ella so broytist myndin í terminalinum a flogvøllinum. Tá fer Flogfelag Føroya, sum í árvís hevur hildið til beint við síðuna av innskrivingardiskinum, at flyta yvir um gólvið í hølini, sum Atlantsflog hevur hinumegin. Og vitiligt fer Atlantsflog so at yvirtaka hølini, sum Flogfelagið higartil hevur hildið til í.

Grundin er tann, sigur Finnbogi Niclasen, flogvallarovasti, at virksemið hjá Flogfelagnum er minkað so munandi, síðan Maersk Air gavst at fúgva, at mett verður ikki, at hølini standa mát við virksemið.

Hinvegin er virksemið hjá Atlantsflogi vaksandi, og tí verður hetta umbýtið nú framt, sigur hann.

Flogfelag Føroya hevur kortini okkurt virksemi eftir á flogvøllinum sjálvum, vísir Finnbogi Niclsen á. Til dømis er Flogfelagið umboð fyri oljuveitaran til flogførini, og hevur nokk so fitt av virksemi av tí.

Tá »nýggja« danska flogfelagið DAT fer at flúgva í Vágar í næstu viku, fer Flogfelag Føroya at vera umboð hjá teimum. Men tað verður rættilig avmarkað tíðarskeið í fyrsta umfari, sigur Finnbogi Niclasen.

Føroya Banki, sum altíð hevur havt deild á flogvøllinum, fer nú eisini at flyta, og verður deildin avloyst av eini maskinu, sum fer at býta føroyskar pengaseðlar um við aðrar seðlar, fólk vil hava.

Áhaldandi tíðindi vilja eisini vera við, at skifti verður í cafeteria á flogvøllinum í næstu framtíð. Eitt hotel skal loysa annað av sum cafeteriavertur á flogvøllinum i Vágum, vilja tíðindini vera við.

Í løtuni er tað Hotel Lonin á Eiði, sum rekur cafeteria og kioskina á flogvøllinum. Men nú frættist áhaldandi, at Hotel Vágar fer at yvirtaka hesa tænastuna.

Men hvørki Finnbogi Niclasen, flogvallarovasti, ella Kári Hentze, leiðari á Hotel Vágum, vilja vátta hesi tíðindi. Tó viðganga báðir, at eitt skifti er upp á tal, og at Hotel Vágar er við í kappingini um at sleppa at reka cafeteria og kioskina á flogvøllinum í Vágum.

Tíðindaskriv frá Føroya Barnaheimi:

## Fløgan Mura er komin út

**Ungfólk á Føroya Barnaheimi hava við góðari hjálp frá kendum tónleikarum og sangarum givið út nýggja fløgu við fjølbroyttum tónleiki**

TÍÐINDASKRIV

Nýggj føroysk fløga er komin á marknaðin. Tað er ungdómsdeildin á Føroya Barnaheimi sum stendur fyri fløguútgávuni. Á ungdómsdeildini verður javnan arbeitt við tónleiki og eru tað tey ungu, ið royna sínar gávur innan hetta økið.

Tey ungu sleppa at royna seg við ljóðførum, sangi og eisini hava fleiri roynt seg í at skriva tekstir og løg saman við eitt nú starvsfólkunum á deildini. Hetta verur alt gjørt við tí endamálið at hava tað stuttligt, at menna tey ungu og teirra evni innan tónleik og at úttrykkja seg kensluliga eitt nú gjøgnum tónleik. Fløgan er eisini givin út við hesum sama endamáli, nevniliga fyri at geva teimum ungu eina kenslu av at hetta er teirra verk. Eisini er fløguútgávan ein liður í at menna tónleikavirksemið á ungdómsdeildini á Føroya Barnaheimi. Yvirskotið frá søluni av fløguni fer óskert til hetta.

Arbeitt hevur verið við fløguni í eitt longri tíðarskeið, og er fløgan "Mura" á einum høgum tónleikaligum støði. Tekstirnir eru fjølbroyttir, alt frá at kalla fosturlands sangum til meira skemtiligar sangir. Eisini løgini eru fjølbroytt. Bæði still og meira lívlig løg.

Stór hjálp er fingin til vega í samband við fløguútgávuna. Tónleikaliga so hava fleiri royndir tónleikarar hjálpt til við fløguni so sum Niclas Johannesen, Jón Mc Birni, Kim Hansen, Jens Marni Hansen o.o. Eisini royndir sangarar so sum Eivør Pálsdóttir, Terji Rasmussen, Pætur við Keldu eru við á fløguni. Umframt tað eru nøvn við, sum helst fara at gera seg galdandi í framtíðini. Fløgan "Mura" hevði ikki sæð dagsins ljós, uttan tann góða stuðul ið fyrst og fremst hevur verið veittur peningaliga, men eisini tónleikaliga. Tí takka børn/ung og starvsfólk á Føroya Barnheimi hjartaliga fyri stuðulin.

Um møguligt yvirskot verur av fløguni, verður tað brúkt til at menna tóleikarbeiðið á FB. Tí fært tú ikki bert eina góða fløgu tá tú keypir "Mura", men ert eisini við til at stuðla tónleikavirkseminum á Føroya Barnaheimi.

Fløgan fæst til keyps á flestu Shell og Statoil støðunum um landið, og í ymiskum øðrum handlum. Eisini ber til at ogna sær fløguna við at ringja beinleiðis til deildina á tlf 352115.

# Brot úr kirkjusøguni

**Heimamissiónsforlag ið gav herfyri út bók við parti av føroysku kirkju- og missiónssøguni. Útávan var í samband við 100 ár dagin hjá Heimamissiónini**

BÓKAÚTGÁVA
*Edvard Joensen*




*Onnur útgávan í røðini um kirkju- og missiónssøguna í Føroyum, sum Johs. Andr. Næs skrivar, eitur »Í Leirum og úr Leirum«*

Herfyri kom onnur bókin í røðini um Kirkju og missiónssøguna í Føroyum út. Tað er Johannes Andreas Næs, sum skrivar, og Heimamissiónsforlagið gevur út.

Onnur bókin eitur »Í Leirum og úr Leirum«, og leiðir heitið beinanveg hugin til Hvalbiar, haðani høvundurin eisini er ættaður.

Bókin lýsir søguliga fyribrigdi í samband við verandi kirkjuligar og samfelagsliga umstøður, siga útgevararnir.

Sum vera man verður nakað væl gjørt burtur úr teimum fyrstu sonevndu missiónsprestunum. Serliga eru tað teir báðir Suðuroyarprestarnir Einar Michael Riise og Franz Busch, sum fáa umtalu í bókini, siga útgevararnir.

Eisini aðrir prestar sleppa kortini upp í part. Eitt nú Sandoyarpresturin Jørgen Falk Rønne, sum sat í Todnesi og eygleiddi føroysk kirkju- og samfelagsviðurskifti. Greitt verður frá hesum viðurskiftum, sum tey vórðu sædd við hansara eygum.

Heimamissiónin hátíðarheldur í ár, at tað eru 100 ár, síðan rørslan kom til Føroya. Tað hevur verið hildið á ymsan hátt. Bæði við stórum og smáum møtum, ymsum tiltøkum kring landið og so eisini við bókaútgávum.

Millum annað hevur Johannes Andreas Næs givið tvær bøkur um kirkju og missiónssøguna út. Tann fyrra nevnist »Varðar á kirkjugøtuni« og kom út í vár.

Bøkurnar kosta kr, 200,- stykkið og fáast í bókabúðunum kring landið, sigur útgevarin, sum er Heimamissiónsforlagið, ið heldur til í Nesvík.